TJÓÐVELDI

Heildarætlan fyri føroysku vælferðina:

# Betri kor & betri løn til vælferðarstørvini



# Ein alneyðug íløga

**Tað er av alstórum týdningi, at okkara samfelag stútt og støðugt tekur øll neyðug stig fyri at tryggja øllum borgarum dygdargóðar tænastur á vælferðarøkinum. Hetta er grundarlagið undir trygd og trivnaði hjá fólki og avgerandi fyri okkara framtíðarmøguleikar sum fólk og tjóð**

Við hesum vilja vit í Tjóðveldi koma við okkara boði uppá, hvørji átøk vit meta vera alneyðug fyri at tryggja sjúkra, heilsu og eldrarøktina eins og tænastur á barnamenningar- og serstovnaøkinum. Fyri okkum snýr tað seg um at tryggja børn, gomul, sjúk, fólk við avbjóðingum o.o. bestu tænastu bæði nú og í komandi tíðum.

Tær tænastur, sum hesir starvsbólkar veita eru eisini grundarlag undir arbeiðsmarknaðinum hjá okkum øllum. Uttan hesar tænastur er arbeiðsmarknaðurin fyri hóttafalli. Komið er at mørkum á hesum starvsøkjum, tí er tað átrokandi neyðugt, at stór tøk verða tikin í stundini, sum tryggja framtíðar vælferðina.

Fortreytin fyri hesum eru starvsfólkini og treytirnar hesi virka undir. Tí er ein íløga í starvsfólkini ein vinningur fyri okkum øll, men serliga hjá teimum, sum tørvar hjálp og tænastu.

Avmarkingin í valdu starvsbólkunum skal ikki síggjast sum ein avmarking av vælferðini ella tørvum á batum á øðrum starvsøkjum, men hetta er ein liður í at bøta um korini hjá lægst løntu arbeiðsfólkunum, sum starvast innan røkt, umsorgan, barnamenningar- og serstovnaøkið, og harvið at samvirka til at okkara børn, gomlu, sjúku og veiku kunnu fá enn betri tænastu nú og komandi.



# Vit í Tjóðveldi vilja

- Framtíðartryggja og menna føroysku vælferðina
- Útbúgva fleiri til heilsu-, umsorganar- barnamenningar økini
- Tryggja góða normering
- Seta eina serliga pulju av til at lyfta lægstu lønirnar innan tað almenna
- Seta gongd á arbeiðið at stytta arbeiðsvikuna
- Tryggja yrkisføri og góða tænastu til fólk nú og komandi
- At ein heildarætlan verður gjørd, sum lýsir, hvussu vit fremja hetta í verki



Tjóðveldi á fundi við
Føroya pedagogfelag



Tjóðveldi á fundi við
Heilsurøktarafelag
Føroya



Tjóðveldi á fundi við
Heilsuhjálparafelag
Føroya



Tjóðveldi á fundi við
Felagið føroyskir
sjúkrarøktarfrøðingar

# Starvsfólkatrotið
## - Avbjóðingin er her longu

Avbjóðingin við at nøkta tørvin á starvsfólkum innan heilsu- og umsorganarøkið er millum fremstu avbjóðingarnar, føroyska samfelagið hevur. Mangan verður víst á, at hetta er ein framtíðaravbjóðing, men hendan risa avbjóðingin er her longu nú.

Vit hava í fleiri umførum lagt uppskot fyri Løgtingið, fyri at fáa útbúgvið fleiri sjúkrarøktarfrøðingar, námsfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar. Viðgerðirnar gjørdu, at landsstýrið bað Búskaparráðið kanna tørvin á vælferðarstarvsfólkum framyvir. Tann temafrágreiðingin vísti m.a. at tørvurin á starvsfólkum komandi 10 árini verður:

**Áleið 1000 fleiri røktarstarvsfólkum innan eldraøkið**
**Áleið 120 fleiri sjúkrarøktarfrøðingum í Heilsuverkinum**
**Áleið 700 fleiri starvsfólkum í Almannaverkinum**

**Sostatt er beinleiðis tørvur á uml. 2.000 fleiri røktarstarvsfólkum komandi 10 árini bara fyri at nøkta verandi tørv og verandi vælferðartænastur.**

Kommunalu eldraøkini hava eisini víst á at longu nú er starvsfólkatrotið ein forðing fyri at veita nøktandi tænastur. Ein stórur hópur av ófaklærdum starvsfólkum starvast í eldrasamstørvunum. Manglandi og skiftandi starvsfólk, og vantandi fakligur førleiki er ikki nøktandi fyri tey, ið tørva tænastuna.

Góða gongdin í samfelagnum, har vit gerast fleiri samstundis sum miðalaldurin hækkar og nýggj viðgerartilboð leggjast til er eitt stórt tilfeingi, sum eisini setir krøv til okkara sjúkrahúsverk, eldraøkið og almannaverkið.

**Gongdin í starvsfólkum innan Almanna- og Heilsuverk:** Vit eru á áleið sama støði sum í 2008. Hetta hóast fólkatalið í sama tíðarskeiði, er vaksið við 3000 fólkum




Kelda: Hagstova Føroya, løntakarar innan almanna- og heilsuverk, 2008-2019

Viðmerking: Hetta er miðal fyri hvørt ár

Temafrágreiðingin hjá Búskaparráðnum segði, at tørvurin á námsfrøðingum á dagstovnaøkinum ikki verður ein stór avbjóðing. Men hetta er ikki rætt. Longu nú fylgja vit ikki ásetingunum í dagstovnalógini um at 2/3 av starvsfólkunum skulu hava námsfrøðiliga útbúgving.

**Í løtuni eru bert 37,8% starvsfólkahópinum á dagstovnaøkinum, sum hevur námsfrøðiliga útbúgving. Í tølum svarar hetta til at 335 námsfrøðingar mangla – bara fyri at fylgja lógini!**

Góðskan í teimum røktartilboðum vit veita er í stóran mun treytað av, hvussu væl starvsfólkini eru fakliga skikkað. Tað er mangar ferðir staðfest, at hægri fakligu førleikarnir hjá starvsfólkunum eru, størri eru sanníkindini fyri yvirlivilsi, og færri komplikatiónir eru hjá sjúklingunum. Tí eiga vit altíð at stíla eftir hægstu fakligu góðsku til okkara borgarar.

Sjálvsagt er sama galdandi á barnamenningarøkinum. Barnaárini eru grundarlagið undir menningini hjá barninum og fortreytin fyri einum góðum og sunnum vaksnalívi. Vit eru sannførd um, at tað hevði verið rætt at sett meira inn fyrstu árini í barnalívinum og har eru námsfrøðingarnar av allar størsta týdningi.

Tað er eisini avgerandi fyri dygdina, at normeringarnar standa mát við arbeiðsuppgavurnar.

## Tað er trupult hjá eldraøkinum, dagstovnaøkinum & Almannaverkinum, at finna útbúna arbeiðsmegi:

Eldrasamstørvini hava trupult at manna størv við heilsuhjálparum og Heilsurøktarum:




Tey 8 eldrasamstørvini vórðu spurd: "Hvussu hevur tað gingið at mannað leys størv á eldraøkinum seinasta árið" Svarið her lýsir, hvussu tað hevur gingið at sett heilsuhjálparar og heilsurøktarar. Kelda: KAF

Av starvslýsingum hjá Almannaverkinum eftir útbúnari arbeiðsmegi, úrslitaðust tær soleiðis




Kelda: Almannaverkið

Dagstovnar hava trupult at manna størv við útbúnum námsfrøðingum:




Tær 21 kommunurnar, ið hava dagstovnatilboð vórðu spurd: "Hvussu hevur tað gingið at manna leys størv á dagstovnaøkinum seinasta árið" Svarið her lýsir, hvussu tað hevur gingið at sett útbúnar námsfrøðingar. Kelda: KAF

Tíbetur er talið á umsøkjarum til útbúgvingarnar á hesum øki lutfalsliga stórt. Hyggja vit eftir grannalondunum, so hava tey torført at fáa umsøkjarar til útbúgvingarnar. Tí støðu eru vit ikki í – enn!

Bæði á Setrinum, sum víst er niðanfyri, og á Heilsuskúlanum eru nógvar umsóknir til fá lestrarpláss.

Avbjóðingin tykist at vera, at skapa starvsvenjingarplássini, sum skulu til og útvega neyðugu starvsfólkini til vegleiðing av lesandi. Helst tí at støðan í forvegin er spent og normeringarnar lágar.

**Tjóðveldi skjýtur upp, at peningur beinavegin verður settur av, at útbúgva fleiri sjúkrarøktarfrøðingar, námsfrøðingar, heilsuhjálparar og heilsurøktarar.**

**Kannast skal um ein útbúgving í sernámsfrøði eigur at setast á stovn í Føroyum.**

**Samstundis má loysn finnast á, at útvega neyðugu starvsvenjingarplássini og starvsvenjingarvegleiðarar.**

**Tilboðini og møguleikarnir hjá ófaklærdum at førleikamenna seg mugu styrkjast og økjast.**

**Hetta gevur starvsfólkunum fleiri starvsfelagar, minkar um arbeiðsbyrðuna, framtíðartryggjar okkara vælferð og tryggjar fakligheit. Hetta letur eisini fleiri velja Føroyar, Setrið, Heilsuskúlan og okkara vælferð til.**

# Umsóknir til Setrið:




Kelda: Setur.fo

Viðmerking: Tølini fyri 2014 og 2016 liggja ikki á heimasíðuni setur.fo

# Ein løn, mann kann liva av?

**Risa avbjóðingin á vælferðarøkinum krevur eisini, at vit taka ógvislig stig fyri at gera starvsøkið meira attraktivt. Vit hava, saman við serfrøðingi, greinað sáttmálaviðurskiftini hjá 5 av teimum feløgunum, sum liggja í lægra endanum tá lønir viðvíkur.**

Sáttmálaviðurskiftini hjá ymisku starvsbólkunum eru sera ymisk. Tað merkir eisini, at fíggjarliga rásarúmið hjá starvsfólkunum er ymiskt. Men tað skerst tó ikki burtur, at soleiðis sum støðan er í dag, er fíggjarorkan hjá teimum lægst løntu beinleiðis eru í fátækraváða og gerandisdagurin tískil er merktur av hesum. Hetta hóast tey eru á arbeiðsmarknaðinum.

Hesir starvsbólkar hava lutfalsliga heldur ikki fingið lut í tí framgongd, sum annars hevur verið í samfelagnum.

Miðalønin í Føroyum seinastu 12 mánaðirnar hevur verið 31.977 krónur um mánaðin. Hyggja vit so eftir miðal-inntøkuni hjá limunum í nevndu fakfeløgunum sæst, at henda liggur niðafyri miðallønina. Miðallønin hjá limunum sær soleiðis út:

Hyggja vit so at, hvat skal til fyri at liva í Føroyum, so gjørdi Almannamálaráðið í 2013 eitt álit um fátækramark. Í hesum áliti varð ásett eitt minstabuskjett. Hetta minstabuskjettið er ikki blivið javnað síðan tá, men nýta vit brúkaraprístalið fyri mat, so kann hetta geva okkum eina hóming av minstabuskjettinum í dag.

| | |
|---|---|
| **Støk kvinna:** | **7.426 kr.** |
| **Støk kvinna við einum barni (4 ár):** | **9.230 kr.** |
| **Støk kvinna við tveimum børnum (4 og 12 ár):** | **14.060 kr.** |

Sostatt sæst greitt, at við bert einari løn frá áðurnevndu feløgunum, er torført at fáa endarnar at røkka saman í gerandisdegnum. Í summum førum ber hetta einfalt ikki til. Sostatt dúva hesir starvsbólkar í stóran mun á inntøkurnar hjá hjúnafelagnum/sambúgvanum, tí tær ikki røkka nokk í sjálvum sær.

***G.G! minstabuskjettið, sum Almannamálaráðið gjørdi, inniheldur ikki bústaðarútreiðslur. Sostatt skal ein stór upphædd setast aftrat. Tað fara vit at hyggja nærri at seinni.***

| | |
|---|---|
| Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar | **25.538,72** kr. |
| Føroya Pedagogfelag | **21.314,00** kr. |
| Havnar Arbeiðskvinnufelag | **15.198,03** kr. |
| Heilsurøktarafelagið | **19.513,46** kr. |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | **15.622,25** kr. |

Miðallønin hjá limunum í feløgunum. Skilt verður ikki millum, hvør arbeiðsbrøkurin er.

Ein av orsøkunum til lágu miðallønina er, at nógvir av limunum í feløgunum arbeiða niðursetta tíð. Sí talvu 1. Sostatt eru tvær sannroyndir at taka atlit til:

Limirnir arbeiða í stóran mun niðursetta tíð og lønin hjá hesum limum liggur langt undir miðallønina.

## Talva 1:

| | Arbeiðsbrøkur | | | |
|---|---|---|---|---|
| | 0,00-0,50 | 0,50-0,75 | 0,75-1,00 | 1,00+ |
| Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar | 19,8% | 20,0% | 51,2% | 9,0% |
| Føroya Pedagogfelag | 21,5% | 29,5% | 39,6% | 9,4% |
| Havnar Arbeiðskvinnufelag | 34,8% | 21,2% | 35,9% | 8,1% |
| Heilsurøktarafelagið | 22,4% | 31,5% | 39,1% | 7,0% |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 34,6% | 29,6% | 29,2% | 6,6% |

Talvan er lænd frá greiningini «37 tíma arbeiðsvika – fyrimunir og vansar»

Hyggja vit so at lønartalvunum, mugu limirnir eisini arbeiða í nógv ár, fyri at koma upp um miðallønarmarkið. Talva 2 vísir, hvussu nógv lønarstig limir hjá feløgunum skulu uppstigast, fyri at náa miðallønina á 31.977 kr. um mánaðin
– við fullum brøki.

Hetta er við fullum brøki. Tá tað harumframt er trupult hjá stórari mongd av limunum at fáa fullan arbeiðsbrøk, vil ein stórur meirluti av limaskaranum í roynd og veru altíð hava eina løn, sum er væl niðanfyri miðallønina í Føroyum. Við øðrum orðum skal eitt týðandi lønarlyft til, fyri at fáa tey at nærkast einari føroyskari miðalløn.

Tá miðallønin hjá hesum fimm feløgunum og miðallønin við fullum brøki í stóran mun liggur niðanfyri miðallønina í Føroyum, er hetta ein sterk ábending um, at hesir yrkabólkar hoyra til láglønarbólkin í Føroyum.

## Talva 2:

| | |
|---|---|
| Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar | **4 lønarstig** |
| Føroya Pedagogfelag | **19 lønarstig** |
| Havnar Arbeiðskvinnufelag | **Ikki gjørligt!** |
| Heilsurøktarafelagið | **13 lønarstig** |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | **Ikki gjørligt!** |

Kelda: Fmr.fo – lønartalvur

# Bústaðarmøguleikar
## - Ella mangul uppá sama

**Fyri at lýsa bústaðarmøguleikarnir hjá hesum starvsbólkinum, taka vit eitt dømi um eini hjún:**



Sára og Jógvan eru hjún. Jógvan er limur í einum av hesum fakfeløgunum. Jógvan hevur eina mánaðarløn á 23.977 kr. og ein arbeiðsbrøk millum 0,8-1,0. Tey eiga tvey børn og skuld í bili á 200.000 kr. Mánaðarligu útreiðslurnar til ljós og hita eru 2.500 kr. Familjan hevur vanligar útreiðslur til tryggingar, samskifti, televarp, o.s.fr.

Latum okkum siga, at tey ynskja at keypa eini hús fyri 3.1 milliónir krónur. Við hesum fortreytunum, skal Sára hava eina mánaðarløn á 35.218 krónur, fyri at fylgja "krøvunum" frá peningastovnunum til tiltøkupening. Legg til merkis, at lønin hjá Sáru er væl omanfyri miðallønina í Føroyum. Men tað er ikki einasta "kravið" frá peningastovnunum. Eitt annað "krav" er, at lutfallið millum ársinntøku og skuld ikki er hægri enn 3,5.

Ársinntøkan hjá Sáru og Jógvan er 710.341 kr. Við sethúsaskuldini á 3.1 mió. kr. og bilskuldini á 200.000 fáa vit skuldarlutfallið 4,72. Við øðrum orðum er inntøkan ikki nóg høg til at fáa fígging til húsini. Sára og Jógvan kunnu í mesta lagi keypa hús fyri 2.54 mió. kr.

Júst hetta vísir, at ein miðal familja ongan møguleika hevur at seta búgv í mistaðarøkinum. Men trupuleikin er samstundis eisini, at sethúsaprísirnir í størru bygdunum hækka skjótt. Familjan verður trýst longur burtur frá miðstaðarøkinum og størru bygdunum. Hetta trýstir síðani eisini prísirnar á sethúsum í smærru bygdunum upp. Hetta er ein ónd ringrás, sum gongur sína gongd og ávirkar okkum øll.

**Miðal sethúsaprísir:**

| | |
|---|---|
| Tórshavn: | **3.284.350** |
| Størri bygdir og býir: | **1.569.332** |
| Smærri Bygdir og býir: | **1.314.929** |

Kelda: Hagstova.fo

# Lønarpulja at lyfta lægstu lønirnar

Nú vit hava hugt at miðalløn, minstabúskjett og møguleikarnar at seta búgv, kann greitt staðfestast, at tað er sera torført hjá hesum starvsbólkunum – sum vit hava og fara at hava alstóran tørv á í framtíðini – at fáa endarnar at røkka saman.

Vit eru fullgreið yvir, at vit hava frælsar samráðingar á arbeiðsmarknaðinum og virða tað. Tó meta vit tað vera eina politiska ábyrgd, at tryggja fólk ikki liva í fátækraváða. Frástøðan hjá hesum feløgum upp á miðallønina er somikið stór, at tað er so at siga ógjørligt at hetta er ógjørligt at røkka við vanligum samráðingum.

**Tjóðveldi skjýtur upp, at sett verður ein serlig pulja av til at lyfta lægstu lønirnar. Tað eigur at verða áhugamál hjá okkum øllum, at tey, ið taka sær av okkara sjúku, veiku, gomlu og okkara børnum fáa virðiliga løn og ikki noyðast at streingjast, tí tey ikki fáa endarnar at røkka sama.**

Við hesum leistinum, verður frælsi samráðingarrætturin enn varðveittur. Feløgini fara, at hava meira at samráðast við, tí hendan puljan verður partur av ásetta lønarkarminum hjá tí almenna. Tey skulu sjálvi avgera, hvussu teirra partur av puljuni verður nýttur.

Vit hava saman við serfrøðingi roknað uppá, hvat eitt møguligt lyft hevði kostað.

Eftir seinastu lønarhækkingini á 2,05% á almenna arbeiðsmarknaðinum verður mett, at í miðal verða 965,5 mió. kr. útgoldnar í lønum árliga til limirnar í hesum fimm fakfeløgunum. Skattir og avgjøld verða mett til at vera 371,5 mió. kr. soleiðis at netto lønarútreiðslan er 594 mió. kr. Hvussu tølini eru býtt sæst á talvuni niðanfyri.

| | Samlað ársløn | Skattir & avgjøld | Netto |
|---|---|---|---|
| Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar | 265.370.787 | 105.616.517 | 159.754.270 |
| Føroya Pedagogfelag | 383.607.589 | 147.404.592 | 236.202.997 |
| Havnar Arbeiðskvinnufelag | 82.060.679 | 29.518.513 | 52.542.166 |
| Heilsurøktarafelagið | 90.142.263 | 33.494.502 | 56.647.762 |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 144.354.007 | 55.504.833 | 88.849.174 |
| Øll feløgini | 965.535.325 | 371.538.956 | 593.996.369 |

Talvan er lænd frá greiningini "37 tíma arbeiðsvika – fyrimunir og vansar"

Vit hava eina avmarkaða umsiting, so tað er torført hjá okkum, at tilskila akkurát hvussu hetta eigur at gerast. Vit tosa ikki um, at øll skulu hava somu løn. Útbúgvingarstøðan og ábyrgd mugu teljast við. Tað snýr seg um at lyfta lægstu lønirnar.

**Seta vit eina lønarpulju við einum netto-kostnaði á 50,34 mió. kr. svarar hetta til, at feløgini fáa 24.000 krónur meir at samráðast við per lim – ella 2.000 krónur um mánaðin per lim.**

Brutto kostnaðurin av hesum hevði verið áleið 95 mió. krónur, men við skattum og avgjøldum høvdu 45 mió. kr. komið inn aftur. Netto kostnaðurin tískil 50,34 mió. kr.

Sum áður nevnt eru lønarlagið og sáttmálaviðurskiftini hjá feløgunum sera ymisk og hjá onkrum limum vil ein minni lønarhækking lyfta lønarstigið upp á miðal og hjá øðrum er sera langt á mál.

Viðvíkjandi einum lønarlyfti er sera umráðandi at leggja avtrat, at tá talan er um láglønarbólkar, er sokallaða nýtslukvotan høg. Hetta merkir, at meginparturin av einari lønarhækking fer út í samfelagið aftur, sum keyp av vørum og tænastum. Sokallaður multiplikatorvirknaður ger eisini, at lønarhækkingin ger um seg fleiri ferðir og stimbrar soleiðis búskaparvøksturin.

Fyri samfelagið kann tað tí vera ein vinningur, at hækka lønina hjá láglønar-bólkum.

| | Samlað ársløn | Skattir & avgjøld | Netto |
|---|---|---|---|
| Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar | 286.152.626 | 116.296.147 | 169.856.479 |
| Føroya Pedagogfelag | 419.603.422 | 164.704.669 | 254.898.752 |
| Havnar Arbeiðskvinnu-felag | 92.859.536 | 34.116.421 | 58.743.115 |
| Heilsurøktarafelagið | 99.381.246 | 37.760.249 | 61.620.997 |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 162.834.573 | 63.974.082 | 98.860.490 |
| Øll feløgini | 1.060.831.403 | 416.851.569 | 643.979.834 |

Talvan er lænd frá greiningini "37 tíma arbeiðsvika – fyrimunir og vansar"

# Javnvág millum arbeiðs- og familjulív

Sum víst er á, er stórur partur av orsøkini til lágu lønina, at stórur partur starvast niðursetta tíð. Ikki altíð frívilliga. Sum støðan er í løtuni við risa starvsfólkatroti, ber beinavegin at áseta at øll, sum arbeiða niðursetta tíð, fáa í boði at arbeiða fulla tíð. Hetta kann hjálpa nakað. Somuleiðis má í nógv størri mun lýsast eftir fulltíðarstørvum.

Tá ið vit hoyra at fólk ikki megna at arbeiða fulla tíð so er hetta tekin um at okkurt ikki er í lagi. Tað kann vera at normeringarnar eru ov lágar, arbeiðsuppgávan ov tung, arbeiðsumhvørvi ikki nøktandi, møguleikar at førleikamenna seg lítlir og ongir, fjarleiðslur ella manglandi leiðsla, manglandi fakligt umhvørvi, ónøktandi tilrættaleggjan av arbeiðstíð, arbeiðsdagurin brotin í fleiri arbeiðsperiodur, lág løn, ov long arbeiðsvika og mangt mangt annað. Tí er neyðugt eisini at hyggja eftir øllum faktorum og gera eina heildargreining um hvat skal til fyri at bøta um arbeiðsumstøðurnar.

**Kanningar, sum avvarðandi fakfeløg hava gjørt, vísa at heili 14% av námsfrøðingum hava verið hjá lækna vegna illgruna um strongd innanfyri seinastu 12 mánaðirnar.**
**Heili 16% av sjúkrarøktarfrøðingum kenna seg strongdar stóran part av tíðini ella alla tíðina.**

Fakfeløgini eru í ferð við at kanna fyrimunir og kostnaðir við at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar. Longu nú er víst á, at tað er ein góð íløga fyri samfelagið, trivnaðin á arbeiðsmarknaðinum og trivnaðin í familjulívinum. Har er avgjørt nógv at vinna, við bæði at økja um arbeiðsbrøkin, minka um arbeiðsvikuna og hækka lønina.

Tað er gott og gleðiligt, at fyrimunir og kostnaðir av styttari arbeiðsviku nú verður kannaðir í Føroyum. Tjóðveldi skjýtur upp, at gera hetta stigvíst og byrjað verður at stytta um arbeðsvikuna hjá starvsfólkum í vakttungum størvum, so sum sjúkrarøktarfrøðingar, námsfrøðingar, heilsuhjálparir, og heilsurøktarar og onnur. Málið er at arbeiðsvikan styttist fyri øll.

# Samandráttur

Komandi árini fara vit at mangla áleið 2.000 starvsfólk innan heilsu- og umsorganarøkini. Longu í dag sæst stórt starvsfólkatrot, ið ávirkar eldraøkið, dagstovnar, almannaverk og heilsuverk.

Fremsta fortreytin fyri, at vit fáa góðar tænastur innan vælferðarøkið er, at starvsfólkini hava nøktandi fakligar førleikar. Tað er mangar ferðir staðfest, at hægri fakligu førleikarnir hjá starvsfólkunum eru, størri eru sanníkindini fyri yvirlivilsi, og færri komplikatiónir eru hjá sjúklingunum. Tí eiga vit altíð at stíla eftir hægstu fakligu góðsku til okkara borgarar.

Sjálvsagt er sama galdandi á barnamenningarøkinum. Barnaárini eru grundarlagið undir menningini hjá barninum og fortreytin fyri einum góðum og sunnum vaksnalívi. Vit eru sannførd um, at tað hevði verið rætt at sett meira inn fyrstu árini í barnalívinum og har eru námsfrøðingarnar av allar størsta týdningi.

Tjóðveldi skjýtur upp, at peningur beinavegin verður settur av, at útbúgva fleiri sjúkrarøktarfrøðingar, námsfrøðingar, heilsuhjálparar og heilsurøktarar. Samstundis má loysn finnast á, at útvega neyðugu starvsvenjingarplássini og praktikvegleiðarar.

**Hetta gevur starvsfólkunum fleiri starvsfelagar, minkar um arbeiðsbyrðuna, framtíðartryggjar okkara vælferð og tryggjar fakligheit. Hetta letur eisini fleiri velja Føroyar, Setrið, Heilsuskúlan og okkara vælferð til.**

Samstundis sum vit koma at mangla fleiri túsund fólk innan hesi økini fyri at veita lívsneyðugar vælferðartænastur, so eru starvsfólkini innan hesi økini millum tey lægst løntu í samfelagnum. Stundum eru tey enntá í fátækraváða.

Tað er eisini sera trupult – fyri ikki at siga ógjørligt – hjá hesum, at seta búgv. Bæði í miðstaðarøkinum og kring landið.

**Hesir starvsbólkar hava lutfalsliga heldur ikki fingið lut í tí framgongd, sum annars hevur verið í samfelagnum. Tjóðveldi skjýtur upp, at sett verður ein serlig pulja av til at lyfta lægstu lønirnar. Tað eigur at verða áhugamál hjá okkum øllum, at tey, ið taka sær av okkara sjúku, veiku, gomlu og okkara børnum fáa virðiliga løn og ikki noyðast at streingjast, tí tey ikki fáa endarnar at røkka sama.**

Greining av lønarlagnum og boð uppá, hvat eitt lyft hevði kostað, er at finna seinni í heftinum.

**Tað er gott og gleðiligt, at fyrimunir og kostnaðir av styttari arbeiðsviku nú verður kannaðir í Føroyum. Tjóðveldi skjýtur upp, at gera hetta stigvíst og byrjað verður at stytta um arbeðsvikuna hjá starvsfólkum í vakttungum størvum, so sum sjúkrarøktarfrøðingar, námsfrøðingar, heilsuhjálparir, og heilsurøktarar og onnur. Málið er at arbeiðsvikan styttist fyri øll.**